Misnøgd um býlingsnavn

Archibald Black, bóndi á Myrkjanoyri í Klaksvík, hevur skrivað býráðnum bræv, har hann harmast um, at nýggi býlingurin á Helnabrekku hevur fingið navnið, á Grashjalla. Staðið, har nýggi býlingur er, hevur einki við Grashjalla at gera, sigur hann

Útstykkingin á Helnabrekku, sum hevur fingið navnið, á Grashjalla. Fleiri byggiloyvi eru longu latin, og fyrstu fara helst at grava út í hesi vikuni

Mynd: Rúna Sivertsen

STAÐANØVN
Rúna Sivertsen

Í brævi sínum til býráðið, sigur Archibald Black, at tað fall honum fyri bróstið, tá hann í Sosialinum í farnu viku las tíðindi um, at býráðið hevði samtykt at kalla nýggja býlingin á Helnabrekku, á Grashjalla.

- Sum bóndi á Myrkjanoyri, havi eg gingið høgt upp í staðarnøvn, og at støðini verða kallað við sínum rætta navni, sigur hann.

Archibald vísir í brævi sínum á, at øll staðanøvnini á garðinum eru uppskrivað, og tað verður lagt fjallfólki eina við at nýta rætta navn á røttum stað.

Nýggja útstykkingin er á Helnabrekku og onga aðrastaðni, leggur bóndin dent á.

Hann sigur, at Grashjalli er eitt stórt øki, ið røkkur frá Ravnagili í sunnan, til Kellingasetur fyri norðan. Har gongur Árnafjarðargøtan undir Høvdanum og tí mesta av Stigabrúnni.

Skalt tú niðan á Grashjalla, mást tú niðan um hamaran og Døglingsstein, sigur hann.

- Hetta skal rættast beinanvegin, sigur Arcibald Black at enda í brævi sínum til Klaksvíkar Býráð.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur við Sosialin, at navnanevndin enn ikki er kunnað um brævið, sum er dagfest 4. novembur, og at hann tí ikki fær úttalað seg um málið.

Eftir hvat skilst, eru skjeytini útskrivað við nýggja gøtunavninum, og eru fólk serstakliga glað um navnið, á Grashjalla.

MÓTTØKA

Polyplast flytir í nýggj hølir

Í tí sambandið hava vit móttøku hósdagin 7.11.2002 kl. 15.00 - 17.00 á Slættanesgøtu 3 (v/ Velbastaðvegin)
Tað vildi gleitt okkum at sæð viðskiftafólk okkara til móttøkuna

Meginfelag Búnaðarmanna varð stovnað í 1977. 45 fólk starvast hjá fyritøkuni í dag. Deildirnar eru:

Mjólkarvirki Búnaðarmanna, Hoyvík

MBM-Føður, Kollafirði

MBM-Kjøt, Hoyvík

Fyritøkan saman við Sølu- og Tænastu á Búnaðardeplinum í Kollafirði.

Endamál felagsins er at veita mjólk, mjólkarúrdráttir og kjøt til tann føroyska marknaðin og eisini í hesum sambandi at veita føður, brúksluti og tænastu til landbúnaðin.

Meginfelag Búnaðarmanna søkir eftir

Samskipara av innkeypinum

Meginfelag Búnaðarmanna er ein fyritøka í støðugari menning, og okkum tørvar tí eitt starvsfólk til at taka sær av innkeypi, prískalkulatión og goymslustýring (logistikki).

MBM bjóðar eitt starv við nógvum spennandi uppgávum, eitt nú at

- Vera samskipari av øllum innkeypi hjá deildum felagsins
- Fasthalda og menna verandi mannagongdir í sambandi við innkeyp
- Hava ábyrgdina av goymslustýringini og syrgja fyri at goymslan verður hildin á einum ræðiligum stigi
- Syrgja fyri at keypandi eftirlit verður gjørt av goymsluni
- Syrgja fyri prískalkulatiónum
- Hava eftirlit við gjørdum avtalum við flutningsfeløgini
- Syrgja fyri tollavgreiðslu av øllum vørusendingum

Vit søkja eftir einum starvsfólki, sum hevur lætt við at samstarva við onnur starvsfólk.

Umsøkjari, sum hevur útbúgving í logistikki hevur fyrimun, men tað er tó ongin treyt.

Kunnleiki til teldu krevst, og nýtir MBM Navision Financials bókhaldskipanina og Microsoft Office.

Løn sambært avtalu. Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 15. november 2002 og skal umsøkjarin helst kunna byrja í starvinum tann 1. januar 2003.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Dánjal Thomsen, fíggjarleiðara, ella Karl á H. Andreasen, skrivstovuleiðara.

MBM

Meginfelag Búnaðarmanna · Búnaðardepilin · 410 Kollafjørður · Telefon 479000

Missa inntøku orsakað av tunnilsgjaldi

Óvissan um gjaldið fyri at ferðast gjøgnum undirsjóvartunnilin hevur gjørt, at ferðavinnan í Vágum hevur mist inntøkur

Bussarnir hjá Giljanesi fara ikki at koyra ferðafólk frá stóru ferðamannaskipunum undir Vestmannasund komandi summar. Óvissa um prísin hevur gjørt, at ferðamannafeløgini hava valt aðrar túrar

Mynd: Edvard Joensen

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

Vágar: Ferðavinnan í Vágum fær ikki kappast við vinnu aðrastaðani í landinum, tí eingin veit, hvat tað fer at kosta at koyra undir Vestmannasundi. Tí ber ikki t l at geva tilboð upp á eitt nú busskoyring, sigur busseigari í Vágum.

Niels Olgar Joensen, sum rekur fyritøkuna Á Giljanesi, ið bæði hevur koyring og gisting í faldaranum, sigur, at hann hevur mist avtalur um koyring við ferðafólki komandi summar, tí eingin veit, hvat tað fer at kosta at koyra gjøgnum undirsjóvartunnilin.

Niels Olgar Joensen sigur, at hann hevði uppskot um túrar í samband við vitjan hjá ferðamannaskipunum, sum plaga at koma til Havnar um summarið. Ætlan hansara var at fáa fólk vestur í Vágar, nú fast samband verður.

[illegible]

ligið, eri eg ivaleysur í, at fleiri høvdu tikið av tí, sigur Niels Olgar Joensen. Men nú hevur incoming felagið, Hoyviking Tours, sum skipar fyri túrunum, boðað frá, at tey ikki kunnu bíða longur og sagt, at tað verða eingir busstúrar vestur í Vágar næsta summar. Í hvussu er ikki við ferðafólki frá teimum skipunum, sum Hoyviking Tours varðar av.

Talan er um eini 25 skip ella so, sigur Niels Olgar Joensen og vísir á, at tað kundi givið væl av inntøku, um ein - fyri ikki at tala um tveir - bussar frá hvørjum skipi koyrdu vestur í Vágar.

Hann sigur, at hann alt heyst hevur roynt at fáa prísin at vita, men tað ber ikki til.

Heldur ikki í skrivandi stund er prísurin avgjørdur, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í p/f Vágatunlinum.

Niels Olgar Joensen sigur, at tað hava staðist trupuleikar av hesi óvissuni

[illegible]

hava spurt seg fyri um ferðatilboð, men kunnu einki nágreiniligt fáa at vita. Og allir prísir, sum standa í ferðafaldarum og tilboðum annars, eru við fyrivarni.

Tað ger so aftur tað, at fólk beinanveg halda seg aftur, tí eingin vil rímiligt risikera at fáa eina eykarokning, eftir at ferðin annars er goldin.

Jólatilboð:
Danmark frá 1.955,-
Keypmannahavn frá kr. 1.955,- t/r
Billund frá kr. 1.993,- t/r
Spyr eisini um prísir til Odense, Århus og Aalborg.
Ferðatíðarskeiðið er frá 10. desember 2002 til 5. januar 2003.
Ferðaseðlar skulu keypast í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð.
Serligar treytir eru galdandi fyri hesar ferðaseðlar og avmarkað pláss er á hvørjum túri. Nógvur barnaavsláttur verður givin.
Vend tær til tína ferðaskrivstovu ella Maersk Air tlf. +45 70 10 74 74
MAERSK AIR
It's got to be perfect